## Harðrend løgregla

Mannarættindafelagsskapir vilja vera við, at løgreglan í eysturafrikanska landinum Mosambik fer alt ov harðliga fram ímóti mótmælsifólki, og at fólk verða skotin uttan ávaring. Eitt nú sigur Amnesty International, at 46 fólk eru fallin fyri løgreglukúlum tey seinastu trý árini. Uppaftur verri er í Suðurafrika. Amnesty International sigur, at í býnum Klipfontein eru 912 fólk fallin í samanbresti við løgregluna tað seinasta árið. Í einum føri skeyt løgreglan ein trý ára gamlan drong, tá hann peikaði við onkrum spískum út ígjøgnum vindeygað á einum bili. Løgreglumaðurin, sum skeyt, helt tað vera ein byrsumúla.



## C-vítaminir hjálpa ikki

Ein týskur stovnur, sum heldur eyga við, hvørja ávirkan ymiskur heilivágur hevur á tey, sum brúka hann, er komin til ta niðurstøðu, at tað hjálpr ikki at taka C-vitaminir ímóti krími. Niðurstøðan byggir á úrslitið av einari kanning, sum Cochrane Collaboration í Bretlandi hevur gjørt, og sum umfataði meiri enn 11.000 fólk. Kanningin vísti, at fólk, sum byrjaðu at fylla seg við C-vitaminum, tá tey fingu krím, gjørdust líka sjúk og vóru sjúk líka leingi sum tey, sum als ikki tóku vitaminir, skrivar Aftenposten.

# Kunnu liva leingi við CTD-sjúkuni

**Síðan hálvan august eru 12 føroyingar aftrat funnir við sjúkuni CTD (carnitin transporter defekt) og komu beinanvegin í viðgerð. Tann elsti sjúklingurin er 69 ára gamal, og alt bendir á, at fólk, sum hava sjúkuna, kunnu liva leingi, um tey halda seg til vanliga føroyska kostin, sigur barnalæknin og granskarin Ulrike Steuerwald**




*barnalæknin Ulrike Steuerwald*

CTD

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Á loftinum í húsinum, har Landslæknin og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu halda til, situr barnalæknin Ulrike Steuerwald og kýtir seg frá morgni til myrkurs.

Hvønn dag hevur hon viðtalur við fólk til langt út á kvøldið.

Fleiri av fólkunum eru tey við CTD.

Tá ið Ulrike ikki er í Føroyum, arbeiðir hon á einum rannsaknarstovni í Hannover í Týsklandi. Tað er tann stovnurin, sum kannar flestu blóðroyndirnar fyri carnitin úr Føroyum.

Hesaferð kom eg til Føroya 2. november, og tá hevði stovnurin í Hannover síðan miðan august kannað 2500-2600 blóðroyndir úr Føroyum, sigur Ulrike Steuerwald.

Við hesum blóðroyndunum eru funnir tólv føroyingar aftrat við CTD-sjúkuni.

Ulrike Steuerwald er fegin, at føst mannagongd nú er fyri fyri tey, ið hava fingið staðfest sjúkuna. Tað er ikki nóg mikið at fáa staðfest sjúkuna. Føst mannagongd má vera fyri, hvussu so skal berast at.

### Føst mannagongd

Mannagongdin er, at beinanvegin, sum tey í Hannover hava staðfest sjúkuna hjá einum fólki, verður ringt til Landssjúkrahúsið, sum aftur beinanvegin ringir til sjúklingin. Viðkomandi verður í skundi lagdur inn á Landssjúkrahúsið, kannaður og settur í viðgerð.

Hvørja ferð ein tilburður verður staðfestur, sleppa næstrafólkini til ókeypis kanningar. So bliva tað fleiri og fleiri, sum bliva kannað. Tað er, sum ringar, ið breiða seg í vatninum.

Av teimum, sum kannað eru síðan august, hava 12 fólk sjúkuna. Yngsta fólkið er fýra ár, og tað elsta er 69 ár.

Tá ið vit finna fólk, sum hava nátt so høgan aldur sum 69 ár, so kann tað vera, at viðkomandi hevur livið at so leingi við tí, tí hann hevur hildið seg til føroyska kostin, turran fisk, turt kjøt og annað, sum inniheldur nógv av carnitini, sigur Ulrike Steuerwald.

### Allastaðni

Hon dugir ikki at siga, um tey, sum sjúk eru, øll eru skyld, ella um nakað ávíst øki í landinum er harðast rakt. Upplýsinarnir, sum fylgja blóðroyndunum til Týskland, eru bert navn og føðidagur, men ikki bústaðurin hjá viðkomandi. Men hinvegin veit Ulrike Steuerwald, at onkur av fólkunum, sum hava fingið staðfest sjúkuna, hava fingið blóðroyndina tikna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og onkur á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tað vil siga, at sjúkan er als ikki avmarkað til Sandoynna, har fleiri tilburðir hava verið. Hon veit um onkran sjúkling í Klaksvík, og sjúklingar eru eisini funnir við bústaði í Eysturoynni.

Tað kann væl vera, at fleiri fólk eru deyð av sjúkuni, men hjá seks fólkum er sjúkuorsøkin staðfest at vera CTD.

Tey hava øll verið ung fólk, tvey áðrenn skúlaaldur og fýra ung vaksin.

Ulrike Steuerwald sigur, at felags fyri tey fýra føroysku fólkini, sum doyðu aftaná barnaárini, er, at tey hava búð í Danmark í longri tíð.

### Kostvanarnir avgerandi

Og so koma vit inn á kostvanarnar.

Teimum, sum hava sjúkuna, vantar eitt evni, ið nevnist carnitin. Nógv carnitin er í føroyskum mati, so sum í turrum fiski, turrum kjøti og kjøtmati sum heild. Føroyskan mat eta fólk ikki so nógv av, tá ið tey fara burtur, og tað er eisini heilt vanligt, at ung fólk leggja um til at eta mat, ið ikki líkist tí føroyska.

Reglurnar eru, at tá ið ein tilburður er staðfestur, verða næstringarnir kallaðir inn og kannaðir ókeypis. Onnur kunnu verða kannað við at gjalda fyri kanningina.

Tað er ikki nóg mikið at gera kanningar út frá blóðroyndunum, ið tiknar verða av nýføðingum. Hvussu høgt carnitin-talið er hjá nýføðingum, veldst um carnitin-talið hjá mammuni. Í USA verður blóðroyndin tikin av barninum sama dag, sum tað kemur í verðina. Tá hesi børnini bliva kannað aftur tvær vikur gomul, bliva dupult so nógv børn funnin við CTD enn við tí fyrstu kanningini. Í Føroyum verður blóðroyndin ikki tikin fyrr annan dagin ella triðja. Tí kann ein rokna við, at fleiri verða funnin her enn í USA, men ikki øll.

Ulrike Steuerwald væntar, at eisini í teimum komandi mánaðunum verða fleiri sjúklingar funnir í Føroyum. Hon metir, at tá ið av tornar, verða tað umleið ein av 800 ella 900 føroyingunum, sum hevur fingið staðfest CTD.

Higartil vita læknarnir um 42 fólk við sjúkuni. Av teimum eru seks deyð. 24 fólk fingu staðfest sjúkuna, áðrenn føstu kanningarnar byrjaðu í august, og síðan tá eru funnir 12 tilburðir. Tey flestu høvdu bara fá ella als ongi sjúkueyðkenni, og tað er takkað veri føroyska kostinum, sigur læknin.

### Góður kostur

Tað er ein sannroynd, at føroyski kosturin ikki einans er góður fyri tey sum hava CTD sjúkuna. Eisini fólk, sum hava eina aðra arvaliga sjúku og ikki kunnu niðurbróta alt stívilsi (glykogen goymslu brek typa 3a ella GSD 3a), hava tað betri við at eta vanligan føroyskan kost.

- Eingin vandi er fyri, at eitt fólk doyr, sum hevur fingið staðfest sjúkuna, um bara viðkomandi kemur í viðgerð og tekur carnitin regluliga. Viðkomandi kann tá liva eitt gott lív, sigur Ulrike Steuerwald.

- Míni ráð til føroyingar eru at halda seg til vanliga kostin. Tey, ið hava sjúkuna, kunnu liva líka leingi sum valig fólk við at taka carnitin og eta vanligan føroyskan mat, sigur barnalæknin Ulrike Steuerwald.